# Russiskur klassikari útgivin á føroyskum



Tað er Eilif Samuelsen, sum hevur umsett russiska klassikaran

**Forlagið Hemlið gevur út enn ein av klassikarunum í heimsbókmentunum í føroyskari týðing. Hesa ferð er tað kendasta skaldsøgan hjá russiska rithøvundanum Ivan Turgenjev,** *Fedrar og Synir*

Útgáva
***Tíðindaskriv***

Skaldsøgan lýsir tað russiska samfelagið mitt í 1800-talinum, har fedrarnir og synirnir umboðaðu tvær heilt ymiskar áskoðanir á samfelagið. Tað gamla lenssamfelagið móti tí nýggja nihilistiska og skilbundna.

Høvuðspersónur í skaldsøguni *Fedrar og Synir,* er Basarov. Hann er sonur ein niðurundirkomnan herdeildarlækna og umboðar tey ungu úr tí stættini, sum nú tekur yvir ræðið eftir aðalssynunum. Hann hevur verið noyddur at klára seg sjálvan undir læknalestrinum. Í síni ytru framferð er hann ósiðaður, tilvitað óhampiligur. Av lyndi er hann harður, og stríðið við at koma ígjøgnum lesturin hevur ikki blíðkað hann. Tá hann er saman við øðrum, er hann hvassur og ágangandi. Hann er sjálvvissur, errin av sínum yrki og hávirðir vísindini. Hann er sannførdur materialistur í grovastu merking. Listin er fyri honum eitt afturlatið land. Ein líkinda evnafrøðingur er tjúgu ferðir meira verdur enn ein stórur yrkjari. Hann hevur eitt rótfest misálit á ta lættkeyptu liberalismuna hjá aðalinum, tí kærleiki teirra til bøndurnar stavar meira frá bókmentunum enn frá lívinum sjálvum. Sjálvur hevur hann ikki serliga høgar tankar um teir. Hann er realistur og bíðar bert ótolin eftir tí degi, tá ið hann kann fara frá orði til gerð, t.v.s. kollveltingina.

Turgenjevi dámar at seta sínar persónar upp ímóti hvørjum øðrum sum mótsetningar. Hann letur Basarov bresta saman við fedrarnar, umboðaðar av brøðrunum Kirsanov, tí aristokratiska, tortrúna Pavel og tí veika, blídliga Nikolaj. Ljós og skuggi verða javnt býtt millum partarnar, og tað hevði verið høpisleyst at tala um rætt og órætt í hesum lógarásetta ættarliðsstríði. Aftur her letur Turgenjev ta óndu lagnuna koma upp í spælið. Basarov verður ásttikin í eini kvinnu, sum í avgerandi løtuni vísir honum aftur. Tað koyrir henda sterka, sjálvvissa mannin um koll.

Eilif Samuelsen hevur umsett bókina, sum er 269 bls. og kostar 240 kr. Bókin fæst til keyps í bókhandlunum og á heimasíðuni hjá Forlagnum Hemlið (www.hemlid.fo), har eisini ber til at lesa brot úr bókini.

# Losja í 100 ár

**Hósdagin verður bókin um losjuna »Støt Viljen« løgd fram í Havn. Talan er um bókaverk á 375 síður um søguna hjá Losjuni í Havn, sum varð stovnað hin 1. mai í 1902.**




**BØKUR**
*Snorri Brend*

**Losjan:** Losjan Støt Viljen er av teimum flestu kend undir felagsheitinum NIOGT. Í bókini verða eisini losjurnar og ungmannadeildinar annars kring oyggjarnar lýstar.

Bókin lýsir partar av siðsøgu okkara og innlit í felagslív, sum tað var í farnu øldini, í tíðarbilum, tá samfelagið var rættuliga lítið øðrvísi, enn tað hevði verið í øldir - serliga ferðalíkindi, samband millum bygdir og oyggjar.

Greitt verður frá stovnarunum, Laurits Henriksen og tí risaarbeiði, sum hann legði í losjuna tey fyrstu árini. Dentur verður eisini lagdur á at lýsa, hvussu fólkaatkvøðan í 1907 fekst í lag, og hvat losjan gjørdi fyri at fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt burtur úr henni.

Væl mundi vera arbeitt, tí fólkaatkvøðan endaði við, at Føroya fólk við stórum meiriluta samtykti at banna rúsdrekkasølu í landinum. Síðani hava ættarlið eftir ættarlið verið virkin í losjuni í Havn alla síðstu øld.

Í 1936 varð Ungmannadeildin hjá losjuni Støt Viljen sett á stovn, og við henni gjørdist losjan eitt tað virknasta felagið í Havn í útvíð tríati ár. Í sekstiárunum bygdi losjan ein nýggjan bygning á Tinghúsvegnum, og hesa somu tíðina vann føroyska goodtemplararørslan sær pláss millum aðrar í altjóða samstarvi.

Í 1973 keypti losjan Uppistovu, sum gjørdist eitt væl dámt stað hjá bæði børnum, ungum og gomlum í sjeyti- og áttatiárunum.

Hetta eru alt partar av hesi lýsing av fyrstu 100 árunum hjá losjuni Støt Viljen. Rithøvundur er Erling Isholm, og Forlagið Mál & Mentan hevur givið út.





# VINN EINA KULA FERÐ

## VIÐ ATLANTIC AIRWAYS

**+ Kular Røtur savnsfløgur og sangbøkur**




Hvønn mikudag og leygardag fram til 23. nov. verður kappingin í blaðnum. Fleiri seðlar, geva størri møguleika at vinna. Drigið verður í Miðlahúsinum 26. november kl. 14, har Trøllapætur, Nósi og Kular Røtur eisini luttaka.

**Vinningar:**
**Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við Atlantic Airways**
10 Kular Røtur savnsfløgur
10 Kular Røtur sangbøkur
10 Jólini hjá Trøllapætur

Nósi
Atlantic Airways
MBM
Postverk Føroya

**Um tú hittir jólamánnin**

1. Hvat hevur drongurin roynt í dagavís?
2. Hvar hongur lykilin til húsið?
3. Hvør heldur jól saman við jólamanninum?

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Send til: **Kular Røtur • Sosialurin • postboks 76 • 110 Tórshavn,** innan 25. nov.

**www.kularrotur.com**

creð 458006